## Roknskaparárið 2023 latið aftur

Gjaldstovan hevur nú latið aftur fyri skrásetingum á roknskaparárið 2023, og roknskaparútskriftir fyri tíðarskeiðið 13-23 eru sendar stovnum.

Verða stovnar varugir við týðandi skeivleikar í roknskapum sínum, skulu teir skjótast gjørligt seta seg í samband við gjaldstovuna fyri at rætta møguligar skeivleikar. Týðandi skeivleiki merkir, at eksternur roknskaparlesari fær skeiva fatan av roknskapinum, verður skeivleikin ikki rættaður. Flytingar millum innanhýsis útgreiningar í roknskapinum (støð, endamál, verkætlanir) eru ikki týðandi skeivleikar fyri eksterna lesaran. Harafturímóti eru vantandi skrásetingar av stórum inntøkum og útreiðslum, herímillum skeiv ella vantandi tíðaravmarkan at rokna sum týðandi skeivleiki.